gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Bjarni Wardum fer til H71

**Ársins áleyopari 2001 fer ikki at spæla við barndómsfelagnum komandi árið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Komandi ár verður tað í hvíta H71-búnanum, at Bjarni fer at royna seg*

Hetta skrivar heimasíðan hjá Kyndli fríggjadagin.

Bjarni sjálvur váttar fyri Sosialinum, at so er, og spurdur um orsøkirnar til hetta, sigur hann:

- Hetta er nakað, sum ljóðar sera spennandi fyri meg. Tað tykist, sum um hoyvíkingar hava stórar ætlanir í ár, og hjá mær er tað spennandi at verða ein partur av hesum.

- Eisini havi eg havt venjaran hjá teimum, Sverra Jacobsen, sum venjara sjálvur, og tað vóru tvey sera góð ár fyri mítt viðkomandi.

- Eg havi havt fimm góð ár í Kyndli, men sjálvur haldi eg, at skal eg royna okkurt annað her í Føroyum, so skal hetta verða nú. Komandi ár rokni eg við at fara til Danmarkar í lestrarørindum, og so fái eg ikki spælt í Føroyum eina tíð, sigur Bjarni at enda.

Júst hvørjar ætlaninar hjá hoyvíkingum eru, dugir Bjarni ikki at siga nágreinuliga, men tað hevur ljóðað, at H71 ætlar at styrkja munandi um hópin til komandi kappingarár.

Tosið hevur gingið um, at felagið skal hava styrk frá fleiri útlendskum leikarum, og við tilgongdini av Bjarna, hava teir í øllum førum tryggjað sær eitt hitt vandamesta álopsparið í landinum. Bjarni varð í fjør næst besti málskjúttin í landskappingini. Tann besta áttu hoyvíkingar sjálvur, og var tað Halgir Dahl Olesen, sum eisini verður í hópinum komandi kappingarár, so tað sær ikki sørt spennandi út hjá hoyvíkingum.

KÍ-FSV:

# Kreppuloysn

**Tað eru tvey lið í kreppu, sum møtast í Klaksvík sunnudagin, og fyri bæði er galdandi, at ein sigur kann loysa upp fyri kreppuni**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað stendur einki til hjá teimum báðum mótstøðuliðunum, sum hittast í Klaksvík sunnudagin. Hjá báðum pørtum eru málini at kalla rapaðið inn seinastu dystirnar, og meðan vágamenn longu hava sent sín venjara til hús, tykist Tomislav Sivic at sita hampuliga leysur í sínum sessi eftir seinastu stórtapini.

### Moyrir unglingar

Einki er at ivast í, at eitt tap móti vágamonnum fer at gera ágangin móti jugoslavanum enn harðari, men hinvegin munnu tey fægstu ivast í, at KÍ fer á vøllin sum stórfavorittur móti vágamonnum.

Hinvegin er heldur einki dulsmál, at klaksvíkingar í løtuni hava stórar trupulleikar, tí hópurin sum so er rættiliga tunnur. Allan Joensen og Tomislav Sivic hava báðir sitið uttan fyri við skaða, og væntandi verður hvørgin teirra tøkur sunnudagin. Ovi Nysted var við móti B36 fyri fyrstu ferð í fleiri dystir, men eisini hann verður mettur sera ivasamur, og har afturat er Fríðin Ziskason leikbannaður.

Fyri stóran part av hinum leikarunum er galdandi, at talan er um sera ungar leikarar. Fleiri somikið ungir, at teir eisini hava aldur til unglingafótbólt, og hetta ger, at dystartalið hjá teimum verður sera stórt. Um talan er um rovdrift ella ikki, skal ikki verða staðfest her, men undir øllum umstøðum er talan um harðan kost fyri ungu leikararnar, og hjá summum teirra tykist møðin nú eisini at vera sjónlig.

### Ikki betri statt

Hevur skorist illa hjá KÍ, so er støðan ikki pettið betri í vágoynni. Síðani teir í øðrum umfarinum vunnu á sandoyingum, hevur einki borið til hjá vágamonnunum, og málini hava at kalla skramblað inn.

Eftir mettapið fyri B36 fekk hetta vágamenn at skifta venjaran út, soleiðis at tað nú eru teir báðir, Albert Ellefsen og Jonhard Joensen, sum sita við stýrisvølin.

Enn er úrtøkan so ikki batnað, og vágamenn eru eisini greiðir um, at teir á ongan hátt eru favorittar, nú farið verður til Klaksvíkar.

Fólkið hjá vágamonnum til uppgávuna er á leið tað, sum roknast kann við. Birgir Joensen fekk reytt seinast, og er tí leikbannaður, men annars eru allir mans tøkir. Hvørt hetta so er nóg mikið til at gera ein vørr í Klaksvík kann bert tíðn vísa.

Eitt tykist tó vist undan dystinum. Bæði liðini fara uttan iva at stríðast av øllum alvi, soleiðis at sleppast kann undan kreppuprátinum, sum hevur eyðkent bæði liðini seinastu vikurnar.

B71-NSÍ:

# NSÍ tríggjar ferðir á útivølli

**Sandoyingar halda framvegis, at teir eiga at hava møguleika ímóti øllum hinum liðunum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Sambært kappingarskipanini áttu NSí og B71 at spælt í Runavík í morgin. Men feløgini eru vorðin samd um, at í morgin skulu tey spæla á Sandi og um, at B71 skal norður til Runavíkar í næstsíðsta umfarinum. Broytingin hevur við sær, at NSÍ hvørja ferð í teimum trimum umførunum, sum eru eftir undan summarsteðginum, skal spæla á útivølli.

Orsøkin til umbýtið er, at teir stríðast við at skifta vøll í Runavík. Teir fóru undir at taka gamla vøllin av mánamorgunin. Teir høvdu roknað við, at tað arbeiðið fór at taka tveir dagar, men teir brúktu fýra dagar um tað. Tað er ikki sum at siga tað at taka teppið av, tá 400 tons av sandi eru í tí.

At vallarumstøðurnar hava verið soleiðis hevur havt við sær, at NSÍ í hesi vikuni hevur vant í Fuglafirði og á Toftum.

### Fáir skaðar

Hjá NSÍ er Djóni N. Joensen leikbannaður. Hann sá reyða kortið í stevnudystinum ímóti GÍ. Eftir drúgvan skaðasteðg er Kári Hansen farin aftur at venja. Men hann verður ikki tøkur í morgin. Allir hinir NSÍ spælararnir eru tøkir.

Hjá B71 stendur væl til við fólki. Eingin spælari er skaddir, og eingin er leikbannaður. Tað hevur ljóðað, at Eli Hentze skuldi vera leikbannaður, men hann hevur bara tvey kort á kontoini – eitt ímóti KÍ og eitt síðsta sunnudag ímóti VB.

B71 var á odda ímóti VB, men teir taptu 3–1. Á Sandi halda teir ikki, at tað var nakar serligur munur á liðunum, og teir spyrja seg sjálvar, hvussu tað hevði tørnað út, um teir høvdu gjørt nýtslu burturúr góða møguleikanum, sum teir fingu, tá støðan var 1–0. Á Sandi ivast teir ikki í, at teir eiga at hava møguleikar ímóti NSÍ. Um teir fara at fáa nakað burturúr, er ein annar spurningur, sum ikki verður svaraður fyrrenn seinnapartin í morgin.

# Nógv mál í Havnini

**Hagtølini fyri seinastu tíggju árini siga frá, at talan vanliga er um málríkan dyst, tá HB eigur heimavøll í grannauppgerðini**

HAGTØL
*Jákup Mørk*

Ikki færri enn 46 mál eru skotin seinastu tíggju árini, tá HB hevur átt heimavøll móti B36. Í hesum telur minniliga stórsigurin hjá HB í 1991 sjálvandi við, men eisini hini árini hevur vanliga verið talan um málríkar dystir.

Ikki óvæntað hevur HB fingið nógv tey flestu av hesum málum, tí tað er bert hent eina ferð hesi tíggju árini, at B36 er farin av vøllinum sum sigursharri.

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-FSV | 4-1 | - | - | 6-0 | 4-0 | 0-0 | - | - | 3-1 | 0-0 | 4-2-0 | 17-2 |
| HB-B36 | 2-2 | 4-2 | 2-3 | 1-0 | 3-1 | 5-1 | 5-0 | 1-1 | 2-1 | 8-2 | 7-2-1 | 33-13 |
| VB-EB/S | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| NSÍ-B71 | 1-1 | 4-0 | - | 3-1 | - | 0-2 | 0-1 | - | 2-2 | - | 2-2-2 | 10-7 |
| GÍ-B68 | 1-2 | 3-0 | 2-2 | 1-1 | 2-1 | 0-2 | 5-2 | 1-1 | 1-1 | 2-1 | 2-4-4 | 18-13 |

### Svangir sandoyingar

Annars vísa hagtølini eisini, at KÍ vanliga hevur havt gott tak á, tá vágamenn hava vitjað í Klaksvík. Tvær ferðir hevur talan verið um málleysan javnleik, men annars hava heimamenninir vunnið allar uppgerðirnar.

Á Sandi hevur leikað meira javnt á, men hóast sandoyingar samanlagt hava verið omaná, so skal leitast aftur til 1995 fyri at finna seinasta B71 sigurin móti NSÍ.

At enda kann nevnast, at skal nakar steðga gøtumonnum, sum higartil hava verið púra einaráðandi í deildini, so verður tað helst B68. Toftamenn hava havt gott tak á í Gøtu – eisini í gullárunum hjá GÍ – men um hetta verður so, fæst ikki at vita fyrr enn mikudagin. Dysturin er nevnliga útsettur vegna Inter-Toto luttøkuna hjá toftamonnum.

Talvan sýnir, hvussu tað gekk, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst seinastu tíggju árini.



gult15 cyan15 magenta15 svart15



# Sól og summar á Gøtusandi

**– Hugnaløta fyri stór og smá**

SUMMAR
*Gøtu Menningarfelag*

Í dag, leygardagin, skipar Gøtu Menningarfelag fyri hini vælumtóktu hugnaløtuni við stórum báli og øðrum spennandi tiltøkum á sandinum í Syðrugøtu.

Byrjað verður kl. 14 við at børn sleppa at sita á rossabaki (ponyríðing).

Kl. 15.30 verður Fjallarenning. Hetta er kapping í at renna/ganga niðan á Støðlafjall og omanaftur upp á tíð. Tríggir teir skjótastu luttakararnir fáa steyp til ognar, og vinnarin fær eisini stórt og vakurt ferðasteyp. Byrjað verður á Gøtueiði, og málstrikan er á sjálvum sandinum í Syðrugøtu. Tey, ið hava hug at taka lut í fjallarenningini, kunnu tekna seg á tlf. 441484 ella 442026.

Eisini verður Tombola og Fiskibrunnur.

Uml. kl. 16.30 fara ung, konur og menn úr Norðragøtu og Syðrugøtu at toga tog móti hvørjum øðrum. Kappast verður um stór ferðasteyp.

Ongum nýtist at ganga svangur á sandinum, tí umframt pylsur og sodavatn, verður eisini kaffi og køka at fáa.

Uml. kl. 17.30 fer felagskórið Gøta/Leirvík at syngja summarsangir, og nýggi borgarstjórin, Haldóra Ranghamar, fer at halda røðu.

Síðani verður kynt í tað stóra bálið á sandinum, og tá verður felagssangur. Heitt verður í hesum sambandi á fólk um at hava grønusangbók við.

Gøtu Menningarfelag væntar, at tað fara at koma eins nógv fólk sum undanfarin ár; tí hetta tiltakið er vorðið ein fastur táttur í summarhugnanum hjá smáum og stórum eysturoyingum og eisini nógvum fólki aðrastaðni frá.

Óneyðugt er helst at nevna, at tað sjálvandi er ókeypis at koma á Gøtusand leygardagin.

So sjálvandi síggjast vit í Gøtu leygardagin.



# Stavanger vil rætta føroyingum hjálpandi hond



*Høvdingar hittast. Jan Christiansen, býráðsformaður býður norska starvsfelaga sínum, Leif Johan Sevland úr Stavanger vælkomman til Føroya.*

*Mynd Jan Müller*

OLJUVINNA
*Jan Müller*

Hesar seinastu dagarnar hevur stór sendinevnd úr Stavangerøkinum vitjað í Føroyum – við sjálvum borgarstjóranum, Leif Johan Sevland á odda. – Vit eru komin til Føroya fyri at bjóða okkum fram í komandi oljuvinnuni. Í tann mun føroyingar ynskja samstarv og samarbeiði við virki, stovnar og fyritøkur í Stavanger og økjunum nærhendis, og tit vilja hava góð ráð, eru vit fús til slíkt sigur ein rættiliga fryntligur og avgjørdur borgarstjóri. Hann heldur tað vera rætt av føroyingum at vilja stýra og leggja útviklingin til rættis sjálvar men heldur eisini, at norðmenn kunnu geva eitt gott íkast til komandi gongdina við sínum 30 ára royndum og vitan frá hesi vinnu. Seinastu dagarnar hava vinnulívsfólk, skúlafólk og politikarar úr Stavangerøkinum vitjað starvsfelagar í Føroyum. Tórshavnar kommuna við borgarstjóranum Jan Christiansen á odda hevur verið vertur, nú talan er um vinarbýir. Á samkomu í býráðssalinum hósdagin beyð Jan Christiansen stavangerfólkinum at verða hjartaliga vælkomin í Føroyum og helt fyri, at føroyingar eru avgjørt sinnaðir til at menna samstarv við norðmenn, eitt nú at keypa vørur og tænastur frá teimum í sambandi við komandi oljuvinnuna, um hesar eru kappingarførar í prísi og dygd. Hann metti tað vera rætt við eini breiðari samvinnu, ikki minst tí at vit froyingar kunnu læra nógv av norsku royndunum.

